# P/F FØROYA LÍVSTRYGGING

## Val av 5 umboðum at røkja áhugamál tryggingartakarans, meðan P/F Føroya Lívstrygging verður einskild.

Vinnumálaráðið hevur heitt á P/F Føroya Lívstrygging um at skipa fyri einum vali, har 5 persónar, sum eru tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging, verða valdir at umboða tryggingartakararnar í sambandi við, at P/F Føroya Lívstrygging skal einskiljast.

Allir tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging hava valrætt og kunnu stilla upp sum umboð og vera stillarar.

**Hvør kann gerast umboð**
Øll, sum eru tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging, kunnu stilla upp til valið. Um tú ynskir at stilla upp sum umboðsfólk, skalt tú boða frá hesum skrivliga til P/F Føroya Lívstrygging, Postboks 206, 110 Tórshavn, í seinasta lagi tann 6. juni 2005.

Fyri at kunna stilla upp til valið, skalt tú hava undirskriftir frá 15 stillarum. Øll, sum eru tryggingartakarar hjá P/F Føroya Lívstrygging, kunnu verða stillarar. Ein persónur kann bert vera stillari hjá einum valevni, og einans eitt valevni kann vera á hvørjum uppstillingarlista.

Núverandi og fyrrverandi stjórar, starvsfólk á P/F Føroya Lívstrygging og teirra hjúnafelagar ella sambúgvar, kunnu ikki veljast sum umboðsfólk. Eingin kann virka sum umboð, um tey eru sett í starv ella arbeiða hjá fyritøkum, sum eru kappingarneytar hjá P/F Føroya Lívstrygging.

Tá ið P/F Føroya Lívstrygging hevur fingið fráboðan frá tryggingartakarum, sum ynskja at stilla upp til val sum umboðsfólk, verður lýst í bløðunum, hvørji valevnini eru og tíðarfreistirnar fyri, nær atkvøðuseðil kann umbiðjast og nær hann skal vera skrivstovu felagsins í hendi.

Tórshavn, tann 23. mai 2005

LÍV

**P/F FØROYA LÍVSTRYGGING**

# Tofta skúla

Hesi størv eru leys at søkja fyri skúlaárið 2005/2006

- 2 fulltíðar lærarastørv fyri lærara í farloyvi
- 2 fulltíðar lærarastørv vegna avlopstímar, og serligan tørv. Tímarnir til serligan tørv eru ávikavist 12 og 9 tímar
- 1 lærarastarv uml. 12 tímar pr. viku, vegna avlopstímar og serligan tørv (endaliga ásett eftir 1. sept. 2005)
- 1 fulltíðar lærarastarv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 1. aug. 2005 til 31. mars 2006
- 1 fulltíðar lærarastarv fyri lærara í barnsburðarfarloyvi frá 1. aug. 2005 til 31. des. 2005

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Lærarfelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1 - 27.4.

- 1 starv sum stuðul, 15 t/v
- 1 starv sum stuðul, 5 t/v
- 1 starv sum stuðul, 5 t/v

Størvini verða lønt sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið.

Øll størvini eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2005/2006 uttan tey bæði størvini vegna barnsburðarfarloyvi.

Nærri fæst at vita um størvini frá skúlastjóranum á tlf. 447332.

Umsóknir skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi 3. juni 2005.

**Skúlastýrið fyri Tofta skúla**
v/ Jóhannus Danielsen
FO-650 Toftir

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 3761,**
P/F FB Holding,
100 Tórshavn.
**Nevnd:** Farin úr nevndini:
Jørn Astrup Hansen,
Heygsbreyt 4, 100 Tórshavn
(nevndarformaður)
**Innkomin í nevndina:**
Torbjørn Andreasen,
Niðaragøta, bygn. 2, íbúð 8,
188 Hoyvík (nevndarlimur)
**Innkomin sum nevndarformaður:** Janus Eyðun Petersen, Varðabú 1,
100 Tórshavn

Skráseting Føroya
tann 20. mai 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. P/F 2702,**
P/F PAM-Offshore Service,
100 Tórshavn.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:**
Gunvør Balle, Kráargøta 1,
160 Argir
**Innkomin sum stjóri:**
Magnus Kristian Magnussen,
Millum Gilja 103,
188 Hoyvík

Skráseting Føroya
tann 20. mai 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 3175,**
Sp/f Eyðbjørn Joensen,
480 Skáli.
**Viðtøkur broyttar:**
04.05.2005
**Partapeningur:** Lækking við kr. 30.000,00 til kr. 50.000,00 til rindan av halli. Hækking við kr. 50.000,00 til kr. 100.000,00
**Inngjaldingarháttur:**
Kr. 50.000,00 við skuldarumskifti til kurs 100.
**Stjórn:**
**Farin frá sum stjóri:**
Eyðbjørn Joensen, 480 Skáli
**Innkomin sum stjóri:**
Don Eyðbjarnarson Joensen,
494 Innan Glyvur

Skráseting Føroya
tann 20. mai 2005

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi fráboðan:**

**Skrásetingar-nr. Sp/f 2538,**
Sp/f Vesturfarið,
100 Tórshavn.
**Viðtøkur broyttar:**
13.05.2005
**Kommuna:**
**Nýggj kommuna:**
Vestmanna

Skráseting Føroya
tann 20. mai 2005

Kristin Balle

---

# Frá Runavíkar Skúlastýri

**Søkt verður eftir lærarum í hesi størv, sum eru tíðaravmarkað til skúlaárið 2005/2006.**

Øll størvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálaráðið í lønarflokkunum 18.1-27.4.

1 starv við 27 lønartímum – avlopstímar. Í tímatalvuni eru m.a. tímar við fjølbrekaðum næmingum og gentuítróttur.

1 starv við 27 lønartímum – fyri lærara í farloyvi. Í tímatalvuni eru m.a. tímar í tilevning og enskum

1 starv 24 lønartímar – avlopstímar. Starvið er treytað av øktari játtan vegna øktum næmingatali pr. 1. sept.

Umsóknirnar skulu vera skúlastýrinum í hendi í seinasta lagi fríggjadagin 3. juni 2005.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til Ásmund Lamhauge, skúlastjóra, tlf. 217331.

**F. Runavíkar Skúlastýri**
v/ Malan Rasmussen, tlf. 441842
Niðari Vegur
FO-660 Søldarfjørður

# Løgtingsins umboðsmaður

## Løgfrøðilesandi (stud. jur.)

Kundi tú hugsa tær at roynt eitt summarfrítíðarstarv hjá Løgtingsins umboðsmanni, so er høvi til tess nú. Umboðsmaðurin sóknast eftir einum løgfrøðilesandi, sum kann starvast á skrivstovuni í summarfrítíðini (einar 5-6 vikur í juli og august mánaði).

Tann lesandi skal saman við hinum løgfrøðingunum eftirkanna mál, sum umboðsmaðurin hevur til viðgerðar. Tað er ein fyrimunur, um tú ert ella er um at vera liðug(ur) við grundútbúgvingina. Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til skrivstovu okkara. Starvstíð og løn verður ásett sambært avtalu.

Umsóknir saman við próvtølum skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi **fríggjadagin 10. juni** og kunnu sendast til:

**Løgtingsins umboðsmann**
Postsmoga 2008
FO-165 Argir

FAROE
LAW
Faroe Law bjóðar heimligar og altjóða loysnir
*Tosið við:*
**Eyðfinn Jacobsen**
**advokat**
**Jens Wang**
**advokatfulltrúa**
Tróndargøta 19
P.O.Box 1218
FI-110 Tórshavn
tel 359 900 - fax 359 901
mobil 219 902 - 219 903
faroe-law@faroe-law.fo
www.faroe-law.fo

LEIGA
AMBOÐ
&
MASKINUR
Kaj Andreasen & Co
BREKKUTÚN 7 · 188 HOYVÍK
TEL 31 56 00

Lesið Sosialin

Sosialurin Sosialurin Sosialurin

Sosialurin -har tað hendir